gult20 cyan20 magenta20 svart20



# Elttør vitjað Agip í Milano



*Eyðun Elttør, landsstýrismaður á vitjan hjá italska oljufelagnum Agip í Milano. Her saman við Agipstjórum, harímillum Inga Højgaard, leiðara á føroysku deildini. Á myndini er eisini Súsanna Sørensen frá Oljumálastýrinum*

**Nú útlendsk oljufeløg fara undir leiting á føroyska landgrunninum heldur Eyðun Elttør, landsstýrismaður tað vera rætt at vitja feløgini, sum hava boðið seg fram í Føroyum fyri harvið at fáa vit betri innlit í, hvat tey veruliga standa fyri, hvørji tey eru og ikki minst, hví tey hava áhuga fyri føroyska landgrunninum.**

OLJUVITJAN
*Jan Müller*

Herfyri var landsstýrismaðurin í oljumálum, Eyðun Elttør gestur hjá almenna italska oljufelagnum Agip, saman við konuni og Súsonnu Sørensen, sum tekur sær av upplýsingartænastuni hjá Oljumálastýrinum. Tey vitjaðiu á høvuðsskrivstovuni hjá risastóra felagnum í Milano. Har var høvi at hitta stjóran fyri Agip umframt at vitja oljuframleiðslu hjá felagnum, ið liggur beint uppat eini náttúrupark. –Tað var áhugavert at síggja, hvussu teir megna at fáa eitt livandi og týðandi umhvørvi og oljuframleiðslu at vera góðar grannar.

Eyðun Elttør heldur tað annars vera rætt at vitja tey oljufeløgini, sum hava boðið seg fram í Føroyum. Harvið fáa vit betri innlit í, hvat tey veruliga standa fyri, hvørji tey eru og ikki minst, hví tey hava áhuga fyri føroyska landgrunninum.

-Nú tá oljufeløg eru sinnað at brúka milliardir av krónum til at bora eftir olju her hjá okkum er eisini rætt at hyggja nærri hesum feløgum.

Eyðun Elttør vísir uppá tað harðasta aftur, at hann við slíkum vitjanum kann koma í lumman hjá oljufeløgunum. –Vit vilja hyggja at, hvussu feløgini arbeiða. Og viðvíkjandi hesi ferðini var eitt av endamálunum at síggja, hvussu teir framleiða olju við síðuna av eini náttúrupark.

Agip er felag, sum arbeiðir rættiliga sjálvstøðugt og oftani leitar á økjum har aðrir ikki eru. Teirra politikkur er eisini, tá teir fara inn í eitt nýtt øki sum tað føroyska, at fara teir uppí hetta arbeiði 100%.

Agip, sum í dag samstarvar við Føroya Kolvetni, hevur eftir hvat Sosialurin fræattir roynt at finna aðrar partnarar eisini, tí tað verður ov tungt at bera tað mesta av váganum einsamalt við undantaki av tí føroyska felagnum. Her hevur verður gitt, at Texaco, sum ikki fekk nakað loyvi í fjør, kann vera ein møguligur partnari hjá Agip: at teir kunnu fara í samráðingar við Agip um at blíva partu av teirra lisensi á føroyskum øki, samtíðis sum Agip afturfyri blívur partur av tí lisensi, sum Texaco hevur fingið bretsku megin markið. Loyvið hjá Texaco í bretska økinum liggur beint uppat tí loyvinum, sum Agip hevur føroysku megin markið.

Tað er annars ikki fyrstu ferð, at ein føroyskur ráðharri vitjar oljufeløg. Í fjør vitjaði løgmaður oljufeløg í Noregi og var entá úti á einum palli. Hann vitjaði eisini oljufeløg í Bretlandi á síni vitjan har í vár.

-Eg haldi tað er rætt at vísa feløgunum virðing og áhuga, nú tey hava sett seg fyri at leita eftir olju her hjá okkum.

Agip hevur annars sett føroying burturav til at taka sær av samvinnuni millum føroyskan oljuídnað og útlendsk oljufeløg.

Eyðun Elttør heldur tað kann gerast styrkin hjá útlendsku oljufeløgunum, at her sita føroysk oddafólk, umframt at tað sjálvandi eisini tænir føroyskum áhugamálum.

Agip, sum fekk loyvi í fyrstu útbjóðing, hevur bundið seg til at bora ein brunn og er ætlanin at seta borin í næsta ár. Agip er eitt av dótturfeløgunum hjá tí risastóru almennu italsku fyritøkuni ENI, sum eisini eigur felag, ið rekur borivirksemi. Tí verður tað helst ein boripallur frá Saipem, ið er borifelagið hjá ENI, ið fer at bora fyri Agip næsta ár.



*Vitjað verður á einum oljuvirki í Milano*

gult21 cyan21 magenta21 svart21

# ítróttur

Nr. 121 • hósdagur • 28. juni 2001 • 75. árgangur • www.sosialurin.fo

# Bakkur á flogbóltslandsliðnum

**Ein av hollastu stuðlunum á oddaliðnum í fyrstu deild í fótbólti skal fyri fyrstu ferð royna seg á landsliðnum. Ikki í fótbólti, men í flogbólti. Tað er Bartal Eliasen, sum fyrr í ár vann bæði lands- og steypakappingina við felagi sínum ÍF**

FLOGBÓLTUR

Tað gongur sum eftir ánni hjá Bartali Eliasen. Klárt á odda í landskappingini og nú á landsliðnum. Men tað er í tveimum ymiskum ítróttargreinum. Á odda í fótbólti og á landsliðnum í flogbólti. Men tey, sum kenna hann vita, at hann er knáur í báðum tveimum.

Tað er einki at dylja yvir, at fótbólturin hevur verið fyrsta ítróttargreinin hjá Bartali. Hann skifti til GÍ fyri nøkrum árum síðani, tí møguleikarnir vóru betri har, og tað er ikki ov nógv sagt, at hann hevur verið ein av týdningarmiklastu leikarunum á GÍ-liðnum, sum í løtuni liggur greitt á odda í landskappingini.

Hetta er eisini nakað, sum landsliðsvenjarin í fótbólti hevur sæð, um enn hann higartil bara hevur brúkt Bartal tvær ferðir í landsliðshøpi. Um fleiri fótbóltslandsdystir leggjast til má tíðin vísa, men við tí í huga, at Bartal bæði er skjótur og sterkur, so skuldi tað ikki undrað nakran.

Um veturin hevur tað verið flogbólturin, sum hevur staðið ovast á breddanum, og eins og við fótbóltinum í GÍ , hevur Bartal verið ein av dyggastu stuðlunum hjá ÍF, sum setti krúnuna á verkið, tá teir fyrr í ár vunnu bæði lands- og steypakappingina. Eitt bragd, sum ÍF ongantíð hevur framt áður.

## Bóltdrongur í ‘89

Hóast Bartal Eliasen skjótt er 25 ára gamal og hevur spælt flogbólt í nógv ár, hevur hann enn ongan landsdyst leikt fyri Føroyar. Boð hava verið eftir honum fleiri ferðir, men hvørja ferð hevur hann verið noyddur at geva avboð, tí kappingarnar hava ligið meðan fótbóltskappingin hevur leikað upp á tað harðasta. Men í ár var øðrvísi og tað er hann fegin um.

- Eg var bóltdrongur tá Oyggjaleikirnir vóru í Føroyum í 1989. Ein partur av flogbóltskappingini varð leiktur á Kambsdali og tá fingu vit smádreingir til uppgávu at vera bóltdreingir. Og hóast eg fegin havi havt hug at verið við til aðrar kappingar, so hava tær allar ligið meðan landskappingin í fótbólti hevur verið. Tí havi eg verið noyddur at geva avboð, sigur Bartal.

Í ár var so eitt undantak. Oyggjaleikirnir hesaferð liggja meðan fótbóltsleikararnir eru í summarfrí og Bartal hevur sett sær fyri at brúka ein part av síni summarfrí við flogbólti á Isle of Man.

- Eg havi avtalu við felagið um at eg kann fara og tá tað er í lagi, so haldi eg, at eg eigi at gera mítt til at Føroyar fáa eitt gott úrslit í flogbóltskappingini.

## Málið er gull

Eins og onnur hevur Bartal fest seg við, at nógvir nýggir landsliðsleikarar eru við hesaferð. Sjálvur skal hann spæla sín fyrsta landsdyst á Isle of Man, men kortini er hann ein av teimum royndu á liðnum.

- Við at hyggja at nøvnum síggja vit, at eingin Mjølnir leikari er við á landsliðnum, meðan ÍF, sum gjørdist meistari, bara hevur tveir leikarar við. Orsøkin er, at annað er komið ímillum, og tá eg havi møguleikan at fara, so haldi eg tað ikki vera rætt av mær at geva avboð enn einaferð, greiðir Bartal frá.

Spurdur, hvørjar vónir hann hevur fyri manslandsliðnum á Isle of Man, svarar Bartal beinanvegin, at tá liðið fer við, so er tað sjálvandi fyri at vinna. Tað er ikki vist, at tað eydnast, men tað eigur í hvussu er at vera málið.

- Sjálvandi eiga vit at hava í huga, at liðið er nógv øðrvísi hesaferð, men hóast nógvir av teimum royndu leikarunum ikki eru við meira er liðið framvegis gott, og málið eigur í hvussu er at vera, at fáa heiðursmerki, sigur Bartal Eliasen at enda.



*Málið er sjálvandi at vinna, men fyri tað er ikki víst, at liðið megnar hetta, sigur Bartal Eliasen millum annað*

# + Konto súkklukappingin

## Úrslit frá súkklukappingini á jóansøku

SÚKKLING
*Tíðindaskriv*

Í samband við jóansøkuna varð skipað súkklukapping á Tvøroyri. Kappingin varð skipað sum einkultstartur. Súkkla var frá Tvøroyrar sjúkrahúsi eftir Ovara vegi til Tjaldavíkar og aftur. Eisini var skipað fyri barnasúkklukapping. Børnini súkklaðu frá sjúkrahúsinum inn til Keypsamtøkuna og aftur. Suðuroyar Sparikassi lat heiðursmerki til luttakararnar.
Úrslitini síggjast niðanfyri.

**Vaksin - Menn**

| | | |
|---|---|---|
| 1 | Gunnar Dahl Olsen | 28 min. 32 sek. |
| 2 | Sverri Mohr Edvinsson | 29 min. 36 sek. |
| 3 | Esmar Joensen | 31 min. 18 sek. |
| 4 | Eli Christianssen | |
| 5 | Eyðun Poulsen | |
| 6 | Geyr Gilsteinsson | |
| 7 | Christian Guttesen | |

Viðm. Miðalferðin hjá teimum vaksnu, var eitt sindur undir 40 km/t.

**Piltar (6-8 ár):**

| | |
|---|---|
| 1 | Jens Pauli Johansen |

**Smá dreingir (9-11 ár):**

| | |
|---|---|
| 1 | Rúni Bláfoss |
| 2 | Rani G. Jacobsen |

**Dreingir 12 til 14 ár:**

| | |
|---|---|
| 1 | Jákup Lutzen |
| 2 | Bergur Johansen |
| 2 | Anfinn Danielsen |

Her vóru báðir nr. 2 við somu tíð.

## Stigatalið í samlaðu kappingini:

**Vaksin - Menn**

| Nr. | Navn | Stig |
|---|---|---|
| 1 | Gunnar D. Olsen | 80 |
| 2 | Esmar Joensen | 64 |
| 2 | Sverri M. Edvinsson | 64 |
| 4 | Eyðun Poulsen | 49 |
| 4 | Eli Christiansen | 49 |
| 6 | Geyr Gilsteinsson | 20 |
| 6 | Kári Simonsen | 20 |
| 8 | Jens Sigurd Simonsen | 18 |
| 9 | Eirikur Olsen | 16 |
| 10 | Christian Guttesen | 14 |

**Pinkur (6-8 ár)**

| Nr. | Navn | Stig |
|---|---|---|
| 1 | Elinborg Ellingsgaard | 40 |

**Piltar (6-8 ár):**

| Nr. | Navn | Stig |
|---|---|---|
| 1 | Knút Glerup | 40 |
| 1 | Jens Pauli Johansen | 40 |
| 2 | Filip Sivertsen | 34 |

**Smá dreingir (9-11 ár) :**

| Nr. | Navn | Stig |
|---|---|---|
| 1 | Rúni Bláfoss | 80 |
| 2 | Rani G. Jacobsen | 68 |

**Gentur (12-14 ár):**

| Nr. | Navn | Stig |
|---|---|---|
| 1 | Randi G. Jacobsen | 40 |
| 2 | Hansa Nybo | 34 |

**Dreingir 12 til 14 ár:**

| Nr. | Navn | Stig |
|---|---|---|
| 1 | Jákup Lützen | 80 |
| 2 | Bergur Johansen | 64 |
| 3 | Finnur Jacobsen | 34 |
| 3 | Anfinn Danielsen | 34 |
| 5 | Dánjal Michaelsen | 26 |
| 6 | Jimmy Nielsen | 23 |



*Tríggir teir fremstu í kappingini í monnunum síggjast her. Teir eru eisini fremstir í samlaðu støðuni*